# Ongar umfatandi umvælingar á skúlan á Ziskatrøð í summar

**Arbeiðið upp á skúlan má sjálvsagt gerast í frítíðunum, og upprunaliga ætlanin var, at í summar skuldi tann niðasta gongdin og allur tann bygningurin, sum er gamli skúlin, verða liðugt umvæld. Eisini skuldu alis og lívfrøðisstovurnar gerast í stand. Men orsakað av manglandi handverkarum, verður henda ætlanin nú av ongum**

SKÚLI
*Solby A. Eliasen*

Klaksvík:
Asbjørn Lómaklett, skúlastjóri harmast um, at arbeiðið ikki verður gjørt liðugt nú í summar, men hann sigur, at har er ikki nógv at gera, tá arbeiðsfólkið ikki er til taks. Tí tað eru so umfatandi umvælingar, sum skulu gerast yvir eitt tíðarskeið upp á einar 6 vikur, meðan børnini eru í summarfrí. Tá skulu nógv arbeiðsfólk til.

Alt skal umvælast bæði innan og uttan. Tað vil siga, at bygningurin skal klæðast og vindeygu skulu skiftast út. Innan skal alt loftið takast niður og skiftast, lenolium skal eisini skiftast og eisini er talan um, at veggirnir mugu isolerast. So stutt sagt, skal alt gerast av nýggjum.

Ætlanin var eisini at gera alis og lívfrøðisstovurnar í stand. Tað vil siga veggir, loft og gólv, og so skuldu nýggir møblar og nýggj amboð keypast. Men hetta arbeiðið verður heldur ikki til nakað í summar.

Peningur er játtaður til hetta endamálið. Tríggjar milliónir krónur standa játtaðar á fíggjarlógini til ístandgerð av skúlanum á Ziskatrøð í ár.

Skúlastjórin setur spurnartekin við, um ikki tílíkt krevur longri tíð til at verða tilrættislagt. Her hugsar hann um, at fíggjarlógin verður ikki samtykt fyrr enn árið næstan er liðugt, og nú síggja vit, at tað er ikki nóg long tíð, um nóg mikið av handverkarum skulu vera til arbeiðið á skúlanum.

Asbjørn sigur, at hann hevur gjørt vart við hetta, og so vónar hann, at tað verður tikið til eftirtektar, soleiðis at sama støða ikki tekur seg upp aftur komandi ár.

### Stovur gerast í stand

Asbjørn er komin við einum uppskoti um, hvat so kann gerast við skúlan í staðin fyri, sum eitt plástur upp á sárið.

Skúlin hevur skotið upp, at ein partur av teim játtaðu pengunum í staðin verða nýttir til møblar og ymiskt annað í tær 15 skúlastovurnar á skúlanum, sum enn ikki eru settar í stand.

- Hetta arbeiðið er mett at kosta umleið eina millión, og verður tað góðkent, so verða restin av pengunum settir í ein grunn, sigur skúlastjórin á skúlanum á Ziskatrøð.

Sum nú er, eru tíggju skúlastovur settar í stand. Tær stovurnar eru á ovastu hædd í bygninginum, sum vendir oman og niðan framvið Ziskagøtu. Í teimum stovunum eru nýggir møblar, nýggjar talvur og uppslagstalvur. Eisini eru nýggj skáp, uppivørpa, band og fløguspælari. Umframt hetta eru eisini nýggj kort.

Asbjørn heldur, at tað hevði verið eitt gott hugskot at nýtt ein part av pengunum til hetta arbeiðið. Men enn hevur hann ikki fingið svar frá kommununi. Hann sær tað ikki sum nakran trupulleika, at alt verður skift út, áðrenn veggir og loft verða sett í stand, tí allir møblarnir og annað nýtt inni í stovunum kann takast niður og út úr stovunum, meðan tær verða settar í stand – vónandi í komandi ári.



*Sum sæst á myndini, so eru bert partar av skúlanum á Ziskatrøð liðugt klæddir*

### Virðingin minkar

Onki hevur verið gjørt við skúlan á Ziskatrøð síðani fyrst í áttati árunum. Tá varð hann málaður innan og uttan. Og upp í gjøgnum árini er skúlin farin serstakliga illa. Tað lak illa niður gjøgnum tekjuna og inn gjøgnum vindeyguni. Serliga á teimum síðunum sum venda móti ættunum. Onkrar morgnar komu børnini inn í stovurnar og tað fleyt í vatni um tað heila. Hetta hevur sjálvsagt verið ein ótolandi støða bæði fyri børn og lærarar.

Asbjørn sigur, at tað hevði eisini fleiri smá herverk við sær, tí børnini missa virðingina fyri hølunum. Asbjørn sigur eisini, at trivnaðurin á skúlanum versnaði av vánaligu umstøðunum.

- Hetta sást best nú, eftir at nakrar stovur eru settar í stand. Lærarar og næmingar vilja illa út úr aftur stovunum, tá tey fyrst eru komin inn. Og harafturat, hava stovurnar so at siga fingið frið. Næmingarnir lata seg úr skógvunum, áðrenn tey fara inn. Tað er gott nokk eftir áheitan frá mær, men tey gera tað.

Flokkarnir og lærararnir, sum halda til í teim stovunum, sum ikki er settar í stand enn, vilja sjálvandi eisini sleppa inn í onkra av teimum ístandsettu stovunum, og Asbjørn sigur, at hann roynir eftir besta førimuni at eftirlíka ynskjunum hjá teimum. Men tað ber ikki til at gera øllum til vildar, tí talan er jú um einans tíggju stovur.

Annars eru tekjan og vindeyguni skift út nú, so leki er ikki nakar trupulleiki longur. Tann einasti parturin av skúlanum, sum enn ikki er taktur av nýggjum, er bygningurin, har gamla fimleikarhøllin er. Tann bygningurin er so heldur ikki klæddur uttan enn. Men gamla fimleikarhøllin verður, sum so, ikki nýtt til nakað, sum nú er.

- Ein lítil partur verður tó nýttur til bókagoymslu, sigur Asbjørn og leggur aftur at, at tað lekur ikki niður gjøgnum tekjuna har, sum bókagoymslan er.

Asbjørn sigur, at ikki kann dyljast yvir, at skúlin hevur ikki verið raðfestur serliga høgt upp ígjøgnum níti-árini, men hann fegnast um, at tað nú tykist at verða komin vend í.

Um arbeiðið at seta skúlastovurnar verður gjørt í ár ella ikki, er endaliga upp til kommununa. Men verður tað samtykt, so verður tað gjørt í heystfrítíðini, sum er í oktobur.

Bæði skúlastýrið og námsfrøðiliga ráðið, tað sum fyrr var lærararáði, mæla kommuni til at samtykkja at stovurnar verða gjørdar.

- So eg dugi illa at ímynda mær, at tað ikki verður samtykt, sigur Asbjørn Lómaklett, skúlastjóri á skúlanum á Ziskatrøð.

Jákup Pauli Johannesen, byggiráðgevi:

# Tørvurin á handverkarum stórur

**- Føroyskir handverkarar eru sera mobilir. Teir fara ofta uttanlands at arbeiða í stytri tíðarskeið. Tað vísir seg eisini at vera torført at fáa teir handverkarararnar, sum settu búgv uttanlands, meðan kreppan var, heimaftur á klettarnar at arbeiða**

UMBYGGING
*Solby A. Eliasen*

Klaksvík:
Hetta sigur Jákup Pauli Jóhannesen, sum er byggiráðgevi í umbyggingini av skúlanum á Ziskatrøð.

Hann tekur dømi fram og vísir á, at byggivirkið Kanjon, sum tók sær av umvælingunum á skúlanum í fjør.

Teir hava eisini havt arbeiðið við at umvæla svimjihøllina.

- Tað var ein sera umfatandi umvæling, sum tók longri tíð enn ætlað at gera. Og tað hevur so sogið til sín, sigur Jákup Pauli. Haraftur at hevur Kanjon eisini eldraíbúðirnar uppi á Helnabrekku, sum faktiskt bindur alla manningina hjá teimum. Byggivirkið hevur eisini úr at gera, og byggivirkið hjá Rógva Josephsen hevur eisini ov mikið.

- So her eru heilt einfalt ikki nógv at taka av. So nú mugu vit í gongd við at gera sáttmálar til komandi summar, soleiðis at sama søgan ikki endurtekur seg komandi ár.

Munurin á í ár og í fjør er, at um hesa tíðina í fjør vóru bert 300.000 krónur eftir av játtaðu pengunum í fjør, og tá var ikki greitt um, pengar fóru at verða játtaðir til í ár. Men nú eru so tríggjar milliónir krónur til taks, sum eru játtaðar, og sum skilst á lagnum, so er ætlanin hjá býráðnum at játta eina líknandi upphædd aftur komandi ár, greiðir Jákup Pauli frá.

Annars sigur Jákup Pauli, at bæði býráðið og skúlastjórin skilja væl støðuna, sum hon er nú.

Jákup Pauli sigur, at menn sum hava arbeitt nógv um veturin og várið og enntá inn í summarið treingja eisini til feriu.

- Um teir ikki fáa frí, so koyra teir við hálvum blussi og tað er tað jú ikki nógv meining í.

Eg helt tað simpulten vera óðamannaverk at fara í holt við nakað so umfatandi í ár við so lítlari arbeiðsmegi, sigur Jákup Pauli.

Og so leggur hann aftur at, at man heldur átti at sett út í kortið til komandi ár, at tá skúlin er liðugur, so standa 30 mans uttanfyri til reiðar at byrja arbeiðið sum skjótast. Eisini er ætlanin at nýta millum annað jólafrítíðina í ár til fyrireikingararbeiðið til at seta alis og lívfrøðisstovurnar í stand.

At enda sigur hann, at tað verður tó ikki onki gjørt við skúlan í summar. Tað verða ymisk smáting, sum verða gjørd liðug.

Bilar
Nr. 130 • hósdagur • 11. juli 2002 • 76. árg.

# Opel Vectra - rúmligur kvalitetsbilur

**Nýggi Opel Vectra er komin til landið. Talan er um ein stóran, rúmligan og væl útgjørdan bil. Nógv er eisini gjørt burturúr kvalitetinum og trygdini, ið er á sera høgum støði**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Nýggi Vectra er ein størri bilur enn forgangarin. Kvaliteturin og koyrieginleikarnir eru á sera høgum støði. Bilurin hevur ein heilt nýggjan "multilink" bakaksil og elektroniskt stýrda elektrohydrauliska servostýring, umframt nógva aðra útgerð sum betra um koyrieginleikarnar. Trygdarútgerðin umfatar til dømis airbag framman, í síðunum og gardinairbag, og elektroniskt stabilisering program (EPS). Opel hava eisini patent uppá teirra pedalskipan, sum verjir bilføraran ímóti skaða í beinini við ein samanstoyt, eins og aktivar "anti-whiplash" nakkapútur. Bilurin fekk besta karakter í eini Euro NCAP test millum aðrar familjubilar í sínum klassa.



*Her er Jens Sigurð Simonsen, sølulærlingur hjá P/F Meinhardt Arge, við einum silvurgráum Opel Vectra*

### Aðrar útgávur seinni

Annars fæst Vectra við hópin av eykaútgerð sum er við at økja um trygdina komfortin hjá bilførarnum og teimum ferðandi. Teir fyrstu bilarnir, ið eru komnir á marknaðin, koma við 4 syl. bensinmotorum við 122 og 147 hk og einum dieselmotori við 100 hk. Viðvíkjandi útgerð kann man velja ímillum Comfort, Elegance og Bussiness Line, seinni koma GTS Sport og GTS Elegance við t.d. 3.2 litur V6 motori við 211 hk. Í fyrstu atløgu er Vectra komin sum sedan, seinni kemur hatchback útgávan. Næsta ár kemur ein stationvognur saman við eini MPV útgávu.

## Opel Vectra 1,8 16V Sedan

| | |
|---|---|
| Motorurin | 4 syl. 1.8 litur 16V bensin 122 hk |
| 0-100 | 11,2 sek. |
| Bensinnýtsla | 13,0 km/l |
| Dekkstødd | 215/55-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 459,6 cm |
| Breidd | 179,8 cm |
| Hædd | 146,0 cm |
| Eginvekt | 1275 kg |
| Totalvekt | 1875 kg |
| Viðførisrúm | 500 litrar |
| Prísur | kr. 223.000,- |
| Søluumboð | P/F Meinhardt Arge<br>Við Oyggjarvegin<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 345400 |

# Peugeot 307 SW –við lamineraðum glastaki

**Nú er stationvognurin, Peugeot 307 SW, komin á marknaðin. Bilurin er ein 5+2, ið kann hava upp til 7 sitipláss. Tað, at meira enn helvtin av takinum er glas, gevur sera gott útsýni og ljós inni í bilinum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Peugeot 307 SW er ein nýggj modelltypa, ið sameinir eginleikarnar í einum stationvogni og einum MPV. Peugot 307 SW er bygdur yvir sama plattform sum hatchback útgávan, men aksilfrástøðan er 10 cm longri. Kabinan er innrættað við 3 baksetrum og møguleika fyri 2 setrum á aftastu rekkju, soleiðis at bilurin kann hava tilsamans 7 sitipláss. SW útgávan fæst við 2.0 litur bensinmotori við 138 hk og 2.0 litur HDi dieselmotori við 110 hk. Trygdarskipanin er eisini umfatandi við ESP, (elsktronisk stabilitet program) EBA bremsuassistent, aktivum nakkapútum og seks airbag.



*Jan Hentze, Peugeot sølumaður hjá P/F Meinhardt Arge, sýnir her fram nýgggjasta Peugeot SW við lamineraðum glastaki og 7 sitiplássum*

### Gott ljós inni í bilinum

Setrini á aftastu rekkju, ið kunnu keypast sum eykaútgerð, eru best egnaði til børn og ung upp til 13/14 ár. Aftastu setrini kunnu flytast runt í bilinum eftir egnum ynski á teimum 5 Quickfix monteringsstøðunum í kabinuni. Eisini kunnu øll 3 baksetrini, í miðjuni, stillast aftur og fram eftir ynski. 307 SW er sermerktur av at meira enn helvtin av takinum er lamínerað glas. Tað vil siga, at glastakið byrjar, har sum forrúturin endar. Hetta gevur gott ljós inni í bilinum og gott útsýni til tey ferðandi. Um sólin er ov sterk, kunnu elektrisku sólgardinurnar koyrast fyri, so ljósið ikki sleppur inn tann vegin. Bilurin hevur eisini klimaanlegg og 16" alufelgur sum standard.

## Peugeot 307 SW 2.0 HDi

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2.0 litur 4 syl. diesel 110 hk<br>v. common-rail innspræning |
| 0-100 | 13,8 sek |
| Oljunýtsla | 18,5 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 205/55-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 441,9 cm |
| Breidd | 175,7 cm |
| Hædd | 154,4 cm |
| Eginvekt | 1400 kg |
| Totalvekt | 2025 kg |
| Prísur | kr. 239.000,- (5 persóna)<br>7 persóna + kr. 8.000,- |
| Søluumboð | P/f Meinhardt Arge<br>við Oyggjarvegin<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 345400 |